Lívdin
- í lívd hins hægsta

Apríl 2008



# Allan Conrad vitjar í Føroyum



*Allan Conrad, trúboðari í Tanzania, vitjar í Føroyum frá 7. til 21. apríl*

Frá 7. til 21. apríl vitjar Allan Conrad í Føroyum. Hann er dani og trúboðari í Tanzania.

Ein skrá er gjørd fyri vitjanina hjá Allan Conrad, sum fer at vitja í nógvum ymiskum samkomum kring landið. Hann verður í Lívdini sunnudagin 13. apríl.

Allan Conrad arbeiðir sum trúboðari og byggir flogbreytir fyri Mission Aviation Fellowship (MAF) í Tanzania. MAF er ein stórur altjóða tvørkirkjuligur trúboðarafelagsskapur við deildum um allan heim.

Allan er føddur í Kina, har foreldrini vóru trúboðarar. Tey virkaðu ikki leingi í Kina, tí familjan varð noydd at flýggja orsakað av borgarakríggi. Seinni fóru tey til Tanzania sum trúboðarar.

Allan fekk Allan sær útbúgving sum el-innleggjari í Danmark og hevur arbeitt í nógvum ymiskum londum. Men tað var í Tanzania, hann vildi virka sum trúboðari. Allan sigur, at hann altíð hevur havt hjarta fyri afrikanarum.

Rúni Højgaard, flogskipari, búsitandi í Hoyvík, er umboðsmaður fyri MAF í Føroyum.

## Steinhjørtu til kjøthjørtu

Ezekiel tosar um, at ein dag skal Gud taka steinhjørtu okkara burtur og skifta tey um við kjøthjørtu. “Eg skal geva tykkum nýtt hjarta, og nýggjan Anda skal Eg geva tykkum í bróstið; Eg skal taka burt steinhjartað úr likami tykkara og geva tykkum kjøthjarta” (Ez. 36:26).

Tað, sum hendi í hjørtunum á lærisveinum Jesusar eftir uppreisnina, er undurfult. Ikki fyrr enn nú síggja teir, at alt tað, ið teir høvdu upplivað saman við Jesusi, var fyrireiking til nakað nógv størri, sum lá fyri framman.

Steinhjørtuni á lærisveinunum byrjaðu veruliga at bloytast eftir uppreisnina, og eftir at Heilagi Andin var komin, vórðu lærusveinarnir ongantíð teir somu.

Ja, teir fullu, teir tóku skeivar avgerðir, teir høvdu trupulleikar. Teir máttu sjálvt líða blóðvitnisdeyðan fyri Jesusar skuld. Men teir vóru kortini ongantíð teir somu. Hjørtu teirra vóru klár at møta øllum tí, sum stóð teimum fyri framman. Mátti Harrin hjálpt okkum henda mánaðin at uppliva, at steinhjørtu okkara byrja at verða umbroytt til kjøthjørtu.



*Jógvan Zachariassen*

# Vinir í Lívdini

## Tillukku við próvnum

Jógvan Jacobsen í Hoyvík varð 14. februar 2008 avlærdur sum bakari á bakarínum Grón í Havn. Lærumeistari var Eli Andreasen. Vit ynskja Jógvani tillukku við próvnum.



*Jógvan Jacobsen*

## Tillukku við barninum



13. marts fingu Teresa og Esben Damgaard-Jarnfoss, Tórshavn, eina dóttur. Hon vigaði 1212 gram og var 34 cm long.

## Framsýning hjá Lívsdropunum



Mánadagin 10. mars komu Lívsdroparnir saman fyri seinastu ferð á hesum sinni. Hetta kvøldið bjóðaðu børnini foreldrum og øðrum áhugaðum til eina hugnaløtu og at hyggja at tí, sum tey høvdu gjørt í vetur.

Tiltakið byrjar aftur fyrsta mánadag eftir heystfrítíðina.

## Innsavning til Bíbliur




Á kunningarborðinum í Lívdini stendur ein krukka, sum fólk hava høvi at lata pening í at fíggja prenting av Bíblium í Kina. Kostnaður fyri prent og útbreiðslu av einari Bíbliu í Kina er 20 kr.

Eisini ber til at stuðla tiltakinum við at flyta pening á kontu í Eik: 9181-128.239.7, viðmerkt: Bíbliur til Kina.

Í Kina er í dag tann størsta vekingin í samkomusøguni. Hetta ger, at tørvurin á Bíblium er ovurhonds stórur. Málið er 100.000 Bíbliur til Kina frá Føroyum í 2008. Ábyrgdina av tiltakinum hava Jógvan Zachariassen og Jeffri Johannesen.

## Fyrsti dópurin í Campobasso



Regin Guttesen

Sunnudagin 16. mars var dópur á fyrsta sinni í samkomuni í Campobasso í Italia, har Heidi og Regin Guttesen arbeiða sum trúboðarar.

Tvey ungfólk, Ruben (17) og Chesia (19), vórðu doypt. Sjálv dópshendingin var sera eggjandi fyri samkomuna. Okkurt um 90 fólk komu til dópin. Vanliga koma eini 30 fólk til møtið sunnumorgun.

Skráin gekk væl og uttan trupulleikar, og tey kendu, at Gud brúkti vitnisburðin hjá Ruben og Chesia, dópin, tónleikin og boðskapin at nema við hjørtuni hjá menniskjum, sigur Regin Guttesen úr Campobasso, sum heitir á okkum um at biðja áhaldandi um vernd og andaligum vøkstur í lívinum hjá hesum ungu, sum eru nýggj í samkomuni har.



Ruben og Chesia

## Fyrstu páskamøtini

Fyri fyrstu ferð vórðu páskamøtir hildin í Lívdini. Møtini vóru eitt sindur øðrvísi, enn vit eru von við.

Skírisdag var evnið "Hann elskar okkum líka til endan" við hugleiðingum um tað, sum hendi skírisdag. Eisini var breyðbróting. Langafríggjadag var evnið "Krossvegir" við hugleiðingum um líðingar Jesusar. Páskamorgun var evnið "Hann er upprisin", ein gleðidagur í sambandi við uppreisn Jesusar.

Greitt varð frá samtíð Jesusar, og tey, sum vóru á møtunum, kundu ímynda sær tað, sum veruliga hendi, frá tí at Jesus reið inn í Jerúsalem, til hann varð krossfestur og reis upp aftur páskamorgun.




*Napoleon Smith teknaði krossfestingina, meðan møtið var langafríggjadag*

## Útferð til Suðuroyar

Tey ungu í Lívdini skipa fyri eini ungdómslegu vikuskiftið 11. til 13. apríl í Suðuroy. Farið verður av Havnini fríggjadagin 11. apríl. Stuttligt hevði verið, um nógv komu við, siga fyrireikararnir.

Tilmelding fer fram við at senda e-mail til barbaraaj@gmail.com.

Tilmeldingarfreistin er sett til 6. apríl. Kostnaðurin er 200 kr. fyri hvønn, og tá eru ferðaútreiðslurnar ikki íroknaðar. Tey verða á Tvøroyri og hava leigað eini stór hús har. Á leguni hava tey eitt spennandi evni, stendur á heimasíðuni: www.ung.livdin.fo

# Tiltøk

## Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)



**Undirvísing, bøn og bønarskúli eru týskvøld kl. 20.00**

| | |
|---|---|
| 1. apríl. | Húsbólkar (einki møti) |
| 8. apríl. | Skeiðvirksemi: Trin 4 – "Lív í tilbiðjan" (JZ) |
| 15. apríl. | Skeiðvirksemi: Trin 4 – "Lív í tilbiðjan" (JZ) |
| 22. apríl. | Húsbólkar (einki møti) |
| 29. apríl | Bønarlív (Lív Clementsen) |

**Heimasíða fyri tey ungu**

Tey ungu í Lívdini hava eina tíð havt sína egnu heimasíðu, sum er www.ung.livdin.fo.

## Nógvir løkir smáir

Nógvir løkir smáir gera stórar áir, sigur Sámal Clementsen, sum stendur fyri innsavningini av frímerkjum og telekortum, sum hann ger klár og síðan sendir til Kristnastovu í Keypmannahavn fyri at stuðla arbeiðinum har.

Sum myndin sýnir, hevur Sámal í løtuni eina rúgvu av frímerkjum, sum hann ger klár at senda. Sámal hugnar sær við hesum arbeiði og sigur, at tað tekur honum eina arbeiðsviku (40 tímar) at gera hesa rúgvuna av frímerkjunum á myndini klár at senda. Hann klippir frímerkini út og leggur tey í smáar posar (250 gr.), so teir eru lættir at handfara og fylla lítið hjá teimum, sum hava frímerkini við í viðførinum til Danmarkar. Talan er ikki bert um føroysk frímerki. Øll frímerki hava virði, eisini t.d. íslendsk og donsk, sigur Sámal.



Sámal hugnar sær við hesum arbeiði



Frímerki til eina arbeiðsviku

Á kunningarborðinum í Lívdini stendur ein kassi við áskriftini ”Brúkt frímerki og telekort”. Sámal heitir á fólk, sum fara av landinum, um at siga sær frá, so tey kunnu hava frímerkir við sær í viðførinum. Sámal hevur telefon 312566 / 512566.

## Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla

### Sunnudagin 6. apríl

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Opið evni*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Frá steinhjarta til kjøthjarta (10) – “Kærleikin, sum broytti hjarta Pæturs”*
*Talari: Jógvan Zachariassen*

### Sunnudagin 13. apríl

Familjumøti kl. 10.30: *Mission Aviation Fellowship (MAF)*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Frá steinhjarta til kjøthjarta (11) – “Orðini, sum brendu í hjørtunum”*
*Talari: Jógvan Zachariassen*

### Sunnudagin 20. apríl

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: UngLív*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00 *Evni: Frá steinhjarta til kjøthjarta (12) – “Lyfti um kraft og verju Jesusar”*
*Talari: Jógvan Zachariassen*

### Sunnudagin 27. apríl

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Prát við Ragnar Niclasen*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00 *Evni: Himmalferð Jesusar*
*Talari: Poul Guttesen*

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*



Jógvan



Allan



Poul

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*